

## Laksaprísurin fellur

Hesa seinastu vikuna er prísurin á laksi, sum norsku alararnir hava selt av landinum, fallin hálvt annað prosent. Nordlys skrivar, at í síðstu viku fingu alararnir 24,39 norskar krónur fyri kilo, og tað var 1,5 prosent minni enn í næstsíðstu viku. Hinvegin er laksaútflutningurin vaksin. Í síðstu viku fóru 10.399 tons av landinum, og tað var 1,1 prosent meiri enn vikuna frammanundan. Umframt feska laskin fóru 1.510 tons av frystum laksi av landinum.

## Superkøling av fiski

Føroya Ráfiskakeyparafelag skipar komandi fríggjadag fyri einum tiltaki um feskan fisk. Á skránni er handfaring av rávøru við denti á ymiskar kølihættir, superkøling av fiski, logistikkur og sporføri. Granskingarstjórin á íslendska granskingarstovninum, Matis Sigurjón Arason, og ein starvsfelagi hansara, Bjørn Margeirson, koma til Føroya at kunna um evnið. Harafturat fer Steinbjørn í Dali at greiða frá royndunum frá at seta í verk elektroniskt sporføri í fiskivinnuni. Somuleiðis koma Jóhanna á Bergi og Magni Arge at kunna um framtíðarætlanir innan flutning av fiskavørum.

# Hetta var tað vert

**Kann Hovstunnilin økja um samanhaldið í Suðuroy, hava vit vunnið nógv meira enn bara tað, at vit sleppa frá at koyra um Hovsegg, segði løgmaður, tá ið Hovstunnilin varð tikin í brúk**

HOVSTUNNILIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tann 85 ára gamli Poul Midjord í Hovi var fyrstur at koyra ígjøgnum Hovstunnilin og hann hevði løgmann við sær í bilinum. Hann var eisini fyrstur at koyra eftir gamla Hovsvegnum um Hovsegg fyri skjótt 50 árum síðani*



*Á almennari samkomu í Øravík. Her standa fv. Jóannes Eidesgaard, løgmaður, Annita, kona hansara, Eydna og Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum Armgarð og Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki*

- Hetta er ein dýr íløga. Men eg haldi, at hon var tað vert.

Tað var niðurstøðan hjá Jóanesi Eidesgaard, løgmanni, tá ið hann Hovstunnilin varð tikin í brúk leygardagin.

Hann segði, at tunnilin suðuroyingum sera væl untir og sera kærkomin og hann vónaði, at hann fer at føra framburð og styrki við sær til alla oynna.

Men fyrst og fremst vónaði hann, at vit við hesum bergholinum fara síggja oynna sum eina heild, nakað sum bindur saman og gevur kenslu av sameining, so at minni pláss verður fyri sundurlyndi og meira pláss fyri samanhaldi.

- Tá hava vit vunnið so ótrúliga nógv meira enn tað at sleppa undan at koyra um Hovsegg, segði løgmaður.

### Fólkaræðið víst sína styrki

At gera tunnil ímillum Øravík og Hov er gamalt hugskot, tí tað var frammi longu í fimtiárunum, men tá varð ætlanin slept og vegurin um Hovsegg gjørdur ístaðin.

Hann helt at Hovstunnilin eitt dømi um, har fólkaræðið hevur víst sína veruligu styrki.

- Tað sama kundi sigast, tá ið nýggi Smyril varð bygdur, tí í báðum førum var útspælið frá myndugleikunum eitt annað enn endaliga loysnin.

- Smyril gjørdist munandi størri, tí fólkið á staðnum helt tað vera betri. Og hetta hevur síðan víst seg at vera rætta loysnin. Bergholið millum Øravík og Hov liggur ikki har, sum myndugleikin ætlaði, men har, fólkið á staðnum vildi hava og hetta hevur víst seg at vera rætta loysnin.

- Hetta eru tvey talandi dømi um, at fólkaræðið í Føroyum virkar, tá politikarar taka skilagóð fólkslig krøv til eftirtektar, segði Jóannes Eidesgaard.

Hann vísti eisini á, at Hovstunnilin er í samsvari við null-hugsjónina í ferðsluni.

Men hetta er eisini ein íløga, sum er fult í samsvari við Framsjón 2015, har betraðir og tryggari samferðslumøguleikar eru avgjørdar fyritreytir fyri einum meira samanrunnum Føroyum.

### Tunnil til Suðuroyar

Men Løgmaður hugi eisini longur fram enn til 2015.

- Eg kann ikki lata vera við at hugleiða um komandi Suðurleiðina, har fyrsti partur av hesi ætlan varð viðgjørdur á løgtingi nú henda dagin. Hann hugsar um Sandoyartunnilin.

Hann segði, at tann, sum livir nóg leingi, fer at uppliva, at Suðuroyggin verður bundin fast í meginøkið.

- Verður alt landið sum ein býur, verður samleikin samsvarandi, og hugsað verður tá nógv minni um, hvar íløgur og umráðandi tænastur skulu vera, men at tær eru tøkar, segði løgmaður.